# Samkomublaðið fyri november 2017



KELDAN

Okkara visión er, at Keldan skal vera ein andaligur miðdepil fyri allar Føroyar








www.keldan.fo

Samkomuleiðarapar: Pauli & Jastrid Høj. Tlf. 232511 & 232510

# Orðið



## Lít á Harran

John Petursson av Gørðum

Eg og kona mín Harriet hava gingið í Kelduna síðan 2013. Tá eg minnist aftur á fyrstu ferð, vit vóru á møti, minnist eg, at tað var sera tórført fyri meg, tí at hetta var rættiliga langt frá míni safety zone.

Eg hevði ongantíð verið á møti fyrr, so hetta var sera ókent fyri meg og ógvusligt í mínum eygum tá.

Tá eg var yngri, gekk eg ikki á møti, mítt fokus lá onkra heilt aðrastaðni.

Eg havi altíð havt trupult við at tosa um trúgv, og eldri eg bleiv, meiri trupult gjørdist tað. Eg helt, at tað var torført fyrstu tíðina at koma í Kelduna, tí eg vildi ikki geva meg 100%, var sera afturhaldin og hevði hvørja løtu ein fót uttanfyri – klárur at fara avstað. Eg tímdi ikki at vera har, eg var dømandi yvir fyri teimum, ið dugdu at nevna vers úr bíbliuni uttanat, teimum, sum talaðu í tungum, og teimum, sum hildu armunum uppi undir møtinum. Eg var dømandi ímóti øllum, bara tí at eg **ikki** var soleiðis. Men tað var okkurt, sum gjørdi, at eg **ikki** fór avstað og bleiv við at koma aftur– meiri vit gingu í Kelduna, betri kendi eg meg.

Tað vóru ikki bara sjálv møtini - í byrjanini var tað kanska tað, ið fylti minst uppá onkran máta, men tað var tann samveran, ið var áðrenn, ið gjørdi, at eg kendi meg so væl. Hettar at kenna, hvussu blíð øll vóru. Hvørja ferð, áðrenn eitt møti byrjaði, kom onkur yvir at heilsa uppá, spurdi inn til, hvørji vit vóru, og spurdu annars bara, hvussu vit høvdu tað – tað var ein fantastisk kensla at føla seg so vælkomnan og at síggja, hvussu nógv Keldan ger burtur úr, at fólk skulu føla seg vælkomnan.

Tað er ein tala, sum var á einum av teimum fyrstu møtunum, eg var á, ið eg minnist sera væl afturá. Pauli talaði, og eg minnist, at hann legði stóran dent á, at tú skalt vera tú. Um ein, ið stendur við síðuna av tær, ger eitt, ella tann framman fyri teg ger okkurt annað, merkir tað ikki, at tú skal gera tað – hann legði dent á, at man skal gera tað, sum ein sjálvur følir seg best í at gera. Tað var ein fantastisk tala, og hevur fylgt mær sera nær heilt til dagin í dag, og hendan talan var sera týðandi fyri meg og veg mín til Harran, einki følist meir trygt enn at verða eggjaður til at vera ein sjálvur.

Harrin arbeiðir á gátuføran hátt, hjá summum førir hann tey til sín ógvuliga skjótt, men til aðrar tíðir tekur tað tíð, kanska langa tíð, men Harrin hevur eina ætlan við tær, tú skal bara geva honum tíð og líta á Hann, tí hann svíkir teg ongantíð.

Men tá ið ræðsla fellir á meg, líti eg á Teg!
Sálm. 65, 3: Til tín, ið hoyrir bønir, kemur allur heimur.

# Skrá fyri november

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 30. okt. | kl. 17.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 31. okt. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Leygardagur | 4. nov. | kl. 20.00: | AWAKE við Róa Norðoy |
| Sunnudagur | 5. nov. | kl. 11.00: | Morgunmøti við Búgva V. Olsen<br>Innsavnan av tíggjund og heiløgum gávum<br>Døgurði eftir møtið (tilmelding krevst, freist 31. okt) |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 6. nov. | kl. 17.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 7. nov. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| | | kl. 19.00: | Junior |
| Leygardagur | 11. nov. | kl. 20.00: | AWAKE við Youth-toyminum |
| Sunnudagur | 12. nov. | kl. 11.00: | Morgunmøti við luttøku frá mansleguni<br>Samgframførsla við Sonja I. Jacobsen |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 13. nov. | kl. 17.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 14. nov. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Hósdagur | 16. nov. | kl. 10.30-13.00: | Mammukafé |
| Leygardagur | 18. nov. | kl. 20.00: | AWAKE við Claus Møller (DK) |
| Sunnudagur | 19. nov. | kl. 11.00: | Morgunmøti Claus Møller (DK)<br>Sangframførsla við Heidi N. Andersen |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 20. nov. | kl. 17.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 21. nov. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Leygardagur | 25. nov. | kl. 10.00: | Seminar við Roar Sørensen.<br>Evni: Okkara ábyrgd fyri Ísrael |
| Leygardagur | 25. nov. | kl. 20.00: | AWAKE við Roar Sørensen (NO). Evni: Hví Ísrael? |
| Sunnudagur | 26. nov. | kl. 11.00: | Morgunmøti við Roar Sørensen (NO).<br>Evni: Ísrael Guds eygnasteinur |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 27. nov. | kl. 17.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 28. nov. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Hósdagur | 30. nov. | kl. 10.30-13.00: | Mammukafé |
| Leygardagur | 2. des. | kl. 20.00: | AWAKE við Anju & Øyvind Bjerkenes<br>Evni: Sex og relatiónir. |
| Sunnudagur | 3. des. | kl. 11.00: | Morgunmøti við Paula Høj<br>Sangframførsla við manskóri<br>Innsavnan av tíggjund og heiløgum gávum |

# Lýsingar

**Vitjan av Claus Møller**
Claus Møller er ein evangelistur, ið ferðast í nógv lond við boðskapinum um frælsi og grøðing ígjøgnum Guðs kraft. Claus hevur ein viðkomandi boðskap til okkara tíð. Hann tosar við frímóð og salving. Hesa síðstu tíð hevur Claus Møller upplivað nógvar grøðingar í sínari tænastu. Hann virkar við hesari gávu, nú hann kemur at vitja okkum her í Kelduni 18. og 19. november
Tú ert vælkomin til hesi møti í Kelduni, har tú eisini kanst bjóða øðrum við, sum hava brúk fyri at uppliva Harran til anda, sál og likam.

**Fokus á Ísrael**
Vikuskiftið 25-26 nov. koma vit at seta fokus á Ísrael. Í hesum sambandi koma vit at fáa eina spennandi vitjan av norðmanninum Roar Sørensen. Roar er leiðari fyri ísraelsarbeiðinum hjá Livets Ord í Uppsala. Hann hevur eina bachelor-útbúgving í teologi frá LO university og tvær master-útbúgvingar frá Hebrew University í Jerusalem, eina í ísraelskari mentan og eina í ísraelskum politikki. Hann hevur eitt fjølbreitt arbeiði, ið m.a. inniber at skipa túrar til Ísrael. Roar hevur ein stutttíðar bíbliuskúla í Jerusalem, undirvísir um Ísrael og mangt annað. Roar er giftur og hevur 3 døtrar.
Verið hjartaliga vælkomin til hesi møtini, sum geva eina størri fatan og vitan um Ísrael.

**Jólaveitslan**
Barna og familju jólaveitslan verður sunnudagin 10 des.

**Nýggjársveitslan**
Stóra árliga nýggjarsveitslan fyri vaksin verður fríggjakvøldið 29 des. (meira kunning kemur seinni).



Claus Møller

## Gáva til samkomuna og samkomuvirksemið

Tíggjund/gáva til Kelduna kann flytast á kontu: 9181-1205066 og 6460-1568592
Gáva til missión kann flytast á kontu: 9181-1231369 og 6460-1568606
Gáva til útbygging kann flytast á kontu: 9181-7074346 og 6460-1568584